## Formulavenjararnir hittust

Leygardagin høvdu høvuðsvenjararnir í Formulafeløgunum temadag í FSF-húsinum. Tað var landsliðsvenjarin Jógvan Martin Olsen, sum hevði boðið til fundin, og allir teir 9 føroysku venjararnir vóru á fundinum. Nýggi brasilski venjarin hjá GÍ/LÍF hevði venjing við sínum spælarum í Leirvík hendan dagin. Á fundinum var sjóneykan serliga sett á kropsliga venjing, og hvussu hendan venjingin kann styrkjast enn meira úti í feløgunum. Ein háttur at styrkja venjingina er við serligari kanningarútgerð og kanningum av spælarum, og hetta er nakað, sum fleiri feløg eru farin at gera meira við. Praktisk roynd varð gjørd við spælarum í U19 landsliðshópinum, og venjararnir fingu eisini møguleikan at kjakast um kropsliga venjing.



VB-Stjørnan 21-21 (12-10):

# Ósigraðar á heimavølli

**Hóast Stjørnan nú tvær ferðir hevur vitjað í Vági, so hevur VB enn ikki tapt heimadyst. Og nú eru tær í heilt góðari støðu til at røkka finaluplássinum**

HONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Á heimavølli í Vági eru VB-kvinnurnar mest sum einaráðandi. Hetta hava tær víst nú í skjótt fleiri kappingarár, og aftur sunnudagin mátti Stjørnan ásanna, at hóast sína einaráðandi støðu, so fingu heldur ikki tær stigini við sær úr Vági.



*Tað gekk serstakliga javnt fyri seg, tá Stjørnan sunnudagin var á vitjan í Vági*

### Háspenningur

Gestirnir vóru tó nakað skerdar undan uppgerðini. Hvørki Lise Hjort Hansen ella Joan Midjord Djordjevic vóru tøkar hjá liðnum, og hetta argaði eisini fyrstu longu løtuna.

VB hevði nevnliga hug at seta seg á dystin. Tó at Stjørnan hekk so dánt í teimum, so var tað støðugt VB, sum hevði nøsina framman fyri, og tað var eisini í tráð við spælið, at tær fóru til hálvleiks við eini leiðslu.

Men eftir steðgin gekk nakað nógv javnari á. Eftir at Stjørnan hevði javnaði til 13-13, var ongan tíð meira enn tað eina málið á muni, og talan var veruliga um háspenning millum liðini bæði.

Við 10 minuttum eftir at spæla slapp Stjørnan fyri fyrstu ferð framum, men tað var nú ikki so leingi, at tær áttu leiðsluna.

Ístaðin fekk VB aftur eina lítla yvirvág, og fram til tað seinasta tóktist, sum skuldu tær halda báðum stigunum eftir.

Seinasta álopið í dystinum gav tó tvær útvísingar til VB, og tá Stjørnan so eisini fekk brotskast burturúr, kundi Simona Petersen í vanliga tryggum stíli senda hetta í meskarnar til endaliga javnleikin.

### Finalan í eygsjón

Enn er VB tvey stig aftan fyri Neistan, ið er liðið, sum tær kappast við um rættin at spæla FM-finalu móti Stjørnuni. Men tað er vert at hava í huga, at enn kunnu tær úr Vági væl og viðiliga sjálvar gera av, hvussu leikur fer í hesum.

Neistin hevur nevnliga enn til góðar at vitja í Vági. Og við tveimum dystum av hesum slag eftir á skránni, kann VB væl sjálvt gera av, hvar tær skulu enda á talvuni.

Stjørnan tykist hinvegin bert bíða eftir, hvørja mótstøðu tær fáa í finaluni. Tveir dystir í Vági hava bert givið eitt stig, men í aðrar mátar hevur Stjørnan fingið fult, og tí eru tær nú væl og virðiliga á odda í landskappingini.

## FAKTA

**VB-Stjørnan 21-21 (12-10)**
10 min: 5-3
20 min: 9-9
40 min: 13-13
50 min: 17-18
**Málskjúttar**
**VB:** Daiva Toumaite 9(3), Kristina Holm 5, Laila Jespersen 4, Miriam Michelsen 2, Monika Samuelsen 1
**Stjørnan:** Simona Petersen 9(2), Durita Christophersen 3, Anna Kristina Samson 3, Durita Mikkelsen 2, Bára S. Klakstein 2, Una Olsen 2
**Brotskøst:** VB 3, Stjørnan 2
**Útvísingar:** VB 3, Stjørnan 3
**Dómarar:** Rúni Mohr & Ragnar Simonsen

# Fólk í Sunnmøre eru spent uppá Rógva

**Lokalu fjølmiðlarnir í Sunnmøre fylgja væl við venjingini hjá Hødd IL og Rógva Jacobsen**

FÓTBÓLTUR
*Heri Simonsen*
*heris@sosialurin.fo*



*Rógvi Jacobsen er ikki einasti nýggi spælarin í Hødd, har málið er at vinna seg upp í fremstu røð innan alt ov leingi*



*Pílurin vísir, hvar í Noreg Rógvi Jacobsen nú er staddur*

Fyrsta vikan hjá Rógva í Ulsteinvik er farin aftur um. Nýggja liðið hjá føroyska landsliðsframherjanum tørnaði til seinasta mánadag. Venjarin Sture Fladmark sigur við lokala blaðið »Vikebladet« at venjingarnar hava eitt hægri støðið, enn tá leikarnir hjá Hødd byrjaðu uppá venjingarnar um somu tíð í fjør. Fyrsta venjingarkvøldið var góðveður á graslíkisvøllinum á Høddvoll, har Hødd vanliga venur. Tá Hødd byrjaðu venjingarnar um somu tíð ífjør, var hvassur stormur.

### Spent uppá Rógva

Vikebladet skrivar, at mong sjálvsagt vóru spent uppá at síggja »ta føroysku landsliðsstjórnuna« Rógva Jacobsen. Tað er ein ílogubólkur í nærøkinum kring Ulsteinvik, sum hava gjørt tað møguligt hjá Hødd IL at fáa ein sáttmála í lag við Rógva Jacobsen. Rógvi hevur fingið bústað á einum staði, sum nevnist Anholen.

Blaðið heldur, at Hødd hevur fingið fatur á einum dygdargóðum leikara. Rógvi vísti góðar dygdir í upphitingini, og eisini tá hópurin býtti seg í tvey lið. Rógvi fekk víst, at hann hevði sendingar til viðleikarar, tamdi bóltin væl, rykti skjótt, og - metir blaðið - at Rógvi hevði góða fokusering uppá málið. Frá síðulinjuni ljóðaðu viðmerkingar um, at Rógvi hevur eitt hart og beinleiðis skot. Sjálvt um Sture Fladmark, venjari var nøgdur við fyrstu venjingina, so vil hann ógvuliga fegin fáa til vega fleiri leikarar. Hetta fyri at styrkja enn meira um hópin hjá Hødd.

### Ikki timburmaður

Rógvi Jacobsen sigur við blaðið, at hann er útlærdur timburmaður, men at hann fer ikki at arbeiða nakað við síðunar av yrkisfótbóltinum. Sjálvt um hann veit, at nógv timburarbeiði liggur á láni í Ulsteinvik og har um leiðir. Á veg inn í skiftirúmið eftir lokna venjing, sum vardi hálvan annan tíma, fortelur Rógvi til Leiv Arne Grimstad, blaðmann, at hann stríðist eitt sindur við tað málsliga. Hann skilur bæði føroyskt, danskt, íslendskt og norskt. Men hann stríðist við at fáa sagt tey røttu orðini á tí rætta málinum. Rógvi sigur, at tað er villingarsamt, at hesi fýra málini hava hvør sítt orð fyri brúsu. Á íslendskum er tað »Styrta«, í Noregi er tað »Dusj«. Men vónandi og væntandi fær Rógvi ikki nakrar mál-trupuleikar, hvørki á vøllinum, ella uttanfyri vøllin.